# Hví ikki bert lýsa tjóðveldisfólk friðleys at vera?

HØGNI HOYDAL



At ein løgmaður alment leypir á tingfólk við ósannindum og útspilling, tá hann ikki røkir sínar skyldur mótvegis tinginum, eigur at fáa øll, ið hava minstu virðing fyri fólkaræði at tala at. Men sum vanligt verða tjóðveldisfólk hongd út í staðin...

Eftir at hava upplivað framferðina hjá løgmanni, fjølmiðlaviðgerðina í útvarpinum, lesarabrøv frá politiskum viðmerkjara úr Sjálvstýrisflokkinum og ónevndar viðmerkjarar á netmiðlum seinastu dagarnar, noyðist eg bert at staðfesta: Vanligar siðsemisreglur, ábyrgdarstaðfesting og sannleikakrøv, eru sett fullkomiliga til viks, tá tjóðveldisfólk verða viðgjørd alment. Ongar reglur galda. Til ber at skjóta við skørpum í rúgvuna, siga ósatt og undirgrava fólkaræðið, sum var tað natúrligasta fyribrigdið í heiminum.

Undirritaði var á løgtingsfundi mikudagin 2. desember, og hevði sum vanligt nýtt drúgva fyrireikingartíð at skriva og senda inn fyrispurningar til løgmann og landsstýrisfólk um týdningarmikil viðurskifti - eins og fleiri av tingfólkunum hjá Tjóðveldi. Tjóðveldistingfólkini møttu sum vanligt og høvdu ongan lut í tí óskili, sum skuldi vísa seg hendan dagin. Tá tingfundurin byrjaði, var bert ein landsstýrismaður til staðar. Eftir at nakrir spurningar vóru svaraðir, skuldi næsta landsstýrisfólk í røðina, men var ikki komið í tingið.

**Vælvild frá løgtingsformanni og tingfólki...**

Hetta elvdi til, at tingformaðurin valdi at niðurleggja fundin í eitt longri tíðarskeið. Her kundi hann valt at slitið fundin, men Hergeir Nielsen var ”large” mótvegis landsstýrinum, og tók fundin uppaftur, tá eitt landsstýrisfólk var møtt afturat. Og tingfólk góðtóku hetta, hóast bæði andstøðuog samgongufólk hildu hetta vera grovt. Slíka vælvild høvdu ráðharrar aldri fingið í øðrum parlamentum um okkara leiðir.

Alt hetta gjørdi, at skráin gjørdist so seinkað og útsett, at undirritaði - sum varð kallaður til fundar av Edmundi Joensen um blokkstulsuppskotið á fólkatingi – í góðari tíð avráddi við Tórbjørn Jacobsen at fremja fyrispurningar mínar, eins og vanlig siðvenja er, um okkurt kemur ímillum hjá tingfólki.

Síðani frætti eg í fjølmiðlunum, at út á seinnapartin endurtók støðan á morgni seg, har landsstýrisfólk ikki vóru møtt. Nú møttu hvørki løgmaður ella fiskimálaráðharrin til sínar fyrispurningar. Hetta er sjálvsagt ein álvarslig vanvirðing av fólkaræðinum. Og eg kann vissa um, at kom tað fyri á fólkatingi, hevði tað fingið avleiðingar fyri viðkomandi ráðharra. Tí spurnarrætturin hjá teimum fólkavaldu mótvegis ráðharrum, ið hava ábyrgd av sínum málsøkjum, er sjálvandi ein aðaltáttur í parlamentarismuni og eftirlitinum við fyrisitingini.

Henda støða verður so av røttum átalað av bæði løgtingsformanni og spyrjara.

**...lønt aftur við háð og spott**

Men hvat ger løgmaður: Ja, hann leggur fyrst eftir undirritaða við ósannindum, sum ongan leiklut átti í hendingunum. Og síðani leggur hann eftir Tórbjørni Jacobsen við grovum og niðurgerandi ákærum. Hesi álop leggur hann skrivliga á heimasíðuni hjá løgmansembætinum. Hugsið tykkum: tingfólk hava rættin at seta spurningar á tingi og løgmaður og landsstýrisfólk hava skyldu at svara. Tá løgmaður ikki møtir, leggur hann eftir spyrjarunum og nýtir sítt embætisverk sum amboð! Hendi hetta í einum landi við veruligum fólkaræði, høvdu øll tingfólk – uttan mun til samgongu ella andstøðu – reist misálit á ráðharran.

Uppaftur løgnari er tað, at tá løgmaður av røttum verður átalaður, gevur útvarpið honum beinanveg høvi at svara. Tá hann so í beinleiðis samrøðu leypir á undirritaða, býðst onki høvi hjá mær at svara. Útvarpið letur bert hesa grovu framferð standa og hevur ikki vent sær til mín. Tíbetur valdi so Løgtingsformaðurin at svara til fyrimunar fyri meg, tá hann viðmerkti alt málið í útvarpinum.

Hetta er ein so óhoyrd framferð, ið átti at fingið øll, ið hava nakra virðing fyri fólkaræði at gjørt vart við seg.

**Sjálvt andstøðupolitikarar upp í løgmanskórið**

Men sum vanligt í Føroyum: Eitt valevni hjá øðrum andstøðuflokki – Sjálvstýrisflokkinum – velur at fara upp í kórið hjá løgmanni! Hann leggur eftir undirritaða fyri ikki at røkja sítt arbeiði og fyri at hava valt ”løgtingið frá” - umframt verði eg ákærdur fyri ómoral við peningi. Nei, onki hevur undirritaði valt løgtingið frá ella forsømt nakað arbeiði. Hevði av mínum eintingum skrivað og latið inn 4 væl grundaðar fyrispurningar – og kundi sjálvandi valt onki arbeiði at gjørt ella tikið mínar fyrispurningar aftur. Kann annars aftur upplýsa um, at vit í Tjóðveldi eru einasti flokkur, ið regluliga tekur farloyvi á løgtingi, tá fólkatingsarbeiði ikki sampakkar við tað – og tá gera vit ikki sum øll onnur fólkatingsumboð og fáa løn úr báðum støðum. Hartil rinda fólkatingsumboð Tjóðveldisins 20% av lønini í ein grunn, ið hevur til endamáls at stuðla upplýsing og tiltøkum um føroyskt fólkaræði og sjálvræði. Ein og hvør kann kunna seg um tað arbeiðið, ið Tjóðveldisumboð hava gjørt og gera á bæði løgtingi og fólkatingi – og eru síðani vælkomin at vísa ítøkiliga á, hvar tjóðveldisumboð hava forsømt nakað arbeiði og annars at samanbera við, hvat onnur umboð gera og hava gjørt í hesum størvum.

**At lýsa fólk friðleys**

Men sjálvandi er altíð lættast at leggja eftir Tjóðveldinum – serliga tá landsins stjórn setur alt siðsemi og fólkaræðisligar mannagongdir til viks. Sjálvandi er tað boðberin, ið má skjótast og andstøðan hartast, sum ger sína skyldu. Sjálvandi skal løgmaður sleppa óátalaður, tá hann forsømir sínar skyldur. Og sjálvandi skulu tjóðveldisfólk heldur ikki fáa sama høvi sum onnur at svara aftur, tá landsins løgmaður leypir á tey alment og misnýtir sítt embæti og embætisverk.

Og helst átti bara ein lóg at verðið samtykt, ið einfalt lýsti tjóðveldisfólk friðleys at vera. Tað hevði verið so nógv lættari...

# Rok um lítið og einki!

JÓGVAN Á LAKJUNI
tingmaður



Tað er ein øgilig rúmd, ið Tórbjørn Jacobsen fær í fjølmiðlunum at úttala seg um líkt og ólíkt, og tað er fantastiskt at hann skal koma sær at leggja løgmann og Jacob Vestergaard undir at vanvirða og forakta tingið og renna undan ábyrgd, tá ið spurningar skulu svarast í tinginum.

Mær vitandi hava løgmenn og landsstýrismenn altíð verið til staðar og komið til tíðina at svara fyrispurningum í tinginum, um teir annars hava verið heima. Sjálvandi kemur tað fyri, at landsstýrismenn eru uttanlands, men tá boða teir altíð frá í góðari tíð, at teir eru burturstaddir.

Hetta, sum hendi í tinginum mikudagin, var eitt undantak og eftir mínum tykki eitt hendiligt óhapp. Løgmaður, sum annars altíð møtir rættstundis, var ein minutt ov seinur, og Jacob Vestergaard var fullkomiliga óskyldigur. Hann skuldi jú svara spurningum, aftaná at løgmaður hevði svarað sínum spurningum, og Jacob átti tí ikki tørn fyrrenn kanska ein tíma seinni. Og tí skuldi hann als ikki vera har, tá ið fundurin bleiv slitin!

Tað er púra burturvið av Tórbjørn Jacobsen at leggja hesar heiðursmenn undir at renna undan ábyrgd! – Ótrúligt, at fjølmiðlar ikki gjøgnumskoða hetta, men í staðin fara við upp í kórið hjá Tjóðveldinum!

# Løgtingið ella Fólkatingið – ikki bæði

HEÐIN D. POULSEN
www.hedindp.com



Enn einaferð hava politikarar víst í verki, at teir onga virðing hava fyri landsins veljarum og demokratinum. Vit hoyra um tingfundir, sum mugu niðurleggjast vegna vánaliga uppmøting og um ein løgmann, sum hevur so nógv at gera, at arbeiðsdagur hansara er býttur sundur í sekundir. Eitt syndarligt óskil og ein vanvirðing av føroya fólki, sum nú skal fyrireika seg til at rinda gildið av tí óforsvarliga politikkinum sum hesi somu hava rikið tey síðstu árini.

Tað er eisini komið fram, at formaður Tjóveldsins, valdi at rýma frá sínum skyldum í føroyska parlamentinum og raðfesti - tann kanska djúpari - stólin í danska parlamentinum á Kristiansborg.

Tá vit sum partur av Danmark, hava rætt til sess á Fólkatingi, so eru sjálvandi uppgávur til frama fyri Føroyar at røkja har, men tað skal valdast. Formaðurin í flokkinum, sum rópar harðast um fullveldi, velur bevíst danska fólkavalda tingið framum okkara egna Løgting, hvat líkist hetta?

Sjálvstýrisflokkurin hevur leingi verið av teirri áskoðan, at Fólkatingið er fyri danskar politikkarar, ikki føroyskar. Flokkurin valdi at stilla upp til síðsta fólkatingsval og fer allarhelst, sum aðrir flokkar, eisini at gera tað í framtíðini. Tó hevur flokkurin valt, ikki at stilla formannin upp, júst fyri at umganga at koma út í eina fløkju sum hesa.

**Tvær topp lønir**

Eingin kann røkja tvey fulltíðarstørv nøktandi og fáa tvær topp lønir á konto hvønn mánað afturfyri. Tað er ikki rætt, at ein tingmaður í Føroyum, eisini skal kunna vera limur í danska fólkatinginum. Tingskipanin skuldi verið broytt soleiðis, at løgtingslimur sum eisini fær løn sum danskur fólkatingslimur, missir rættin til løn frá Føroya Løgtingi og skuldi løgtingslimur tikið farloyvi, so leingi hann valdi Fólkatingið framum Føroya Løgting.

# Løgmaður bítur á kampi

TÓRBJØRN JACOBSEN



Nú farið var inn á heimasíðuna hjá landsins hægsta embæti, www.tinganes.fo, kom mær í hug orðini hjá Job: “Vreiði hans slítur meg sundur og eltir meg, hann bítur á kampi móti mær, fíggindarnir hvessa eyguni at mær.” Ein løgmaður, sum vónandi hevði eina veika løtu, táið blekkið skvataði burturúr húsinum, leypur frontalt, í órógvandi sinnismuni, á ein vanligan føroying, sum eisini er tingmaður. Við einum ótali av embætismonnum, spunasmiðum og ráðgevum sum hjálparum, meira og minni fjølskyldir, hevur tað eydnast politiska oddvita landsins at varpa eitt tíðindaskriv út frá løgmansskrivstovuni, ið meiri at kalla kann rópast ein subjektiv menniskjanslig psyko diagnosa av undirritaða.

Í fyrstu tíðindasendingini hjá útvarpinum ímorgun herjaði Kaj Leo Johannesen á Høgna Hoydal, men eftir at løgtingsformaðurin gav løgmanni so vøtturin situr í, á miðdegi, reagerar hann sum ein kiptur hani, ið kann renna í ein góðan minutt eftir at heysurin er slitin av honum. Úti undir væðingini á øllum mannabørnum liggur ein berserkur og slotar. Sum skilst eisini hjá Kaj Leo. Og ístaðin fyri at vísa seg sum ein mann, og átaka sær fulla og heila ábyrgd av mistakinum, við ikki at møta á tingfundinum ígjár, so heldur hann fram sum avvápnaði drongurin í skúlagarðinum, nú hann pumpar greyt úr sínum góða høvdi, og ákærir undirritaða fyri líkt og ólíkt.

Eg havi ongantíð mist orðið, hvørki á Løgtingi ella á Fólkatingi. Átalurnar frá formansskapinum hesi næstan 12 árini í politisku skipanini kunnu teljast á einari hond, tí skilji eg ikki rættiliga, hvat ið gongur fyri seg handan skallabeinini á løgmanni. Ákærurnar kennast tó aftur frá eini sending í Rás2, har maðurin slapp at sita og pussa sína gloriu og busta sínar veingir við at átala onnur, - harímillum fleiri tingmenn. Annars situr Kaj Leo tíðum og órógvar tingviðgerðirnar, serliga táið tjóðveldisfólk hava orðið, hetta vita øll sum ferðast í umhvørvinum, men yvirhøvur bera fólk yvir við barninum í vaksna kroppinum.

At løgmaður ikki virðir tað mest fundamentala í politisku skipanini, skákingina ímillum valdini, við ikki at møta á fundi, har evsta valdið hevur ætling um at fregnast um politisk mál hjá útinnandi valdinum, er nú eitt, annað er, at sami maður brúkar heimasíðuna hjá landsins hægsta embæti at svína ein vanligan føroying út, við allari tí óhumsku sum sálarligu løðingar hansara goyma í sær.

Fegnist alt meira, fyri hvønn dag sum gongur, at eg atkvøddi ímóti, sum hin einasti annars, at Kaj Leo Johannesen gjørdist Føroya løgmaður. Sum ein kendur statsmaður einaferð bar fyri munni: “Søgan fer at geva mær rætt !” Fyri samfelagsins sakir átti tingið ongantíð at sagt hesum kallinum tey kendu orðini: “Welcome, Mr. Chance.”

ES: Annars fari eg at heita á løgmann um at fáa onkran at rætta stavivillurnar, áðrenn hann aftur fer at senda líknandi ríður av illsinnisglepsum út á allar landsins portalar, og harvið kring allan heimin.